# John Rødgaard snarmeistari

**Eins og í fjør varð IM John Rødgaard suvirenur í árligu FM-snarkappingini, sum varð avgreidd um vikuskifti.**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Nógvir av okkara heimligu elitutelvarum, umframt útisetar, settu dám á FM-snarkappingina. Telvað varð í Kommunuskúlaaul-uni leygardagin 6. juli. Millum teir 31 luttakararnar, sóust eisini fyrrverandi føroyameistarar, sum enn stríðast manniliga. Eitt nú gekst væl hjá brøðunum Andriasi og Súna Ziska.

Umframt veteranar og elitutelvarar, royndu nakrir ungir unglingar seg, og ein av teimum, Rani Baldursson, bardi seg heilt upp til eitt flott níggjunda pláss.

### Fremstur alla kappingina

Longu frá fyrsta bríksli legði vinnarin John Rødgaard seg á odda, og har varð hann verandi. Tó skal nevnast at hann ongantíð var fleiri enn tvey stig fremstur, og tí varð spenningurin ongantíð í vanda. Níggju dupultumfør blivu telvd.

John, sum er kendur fyri at koma í tíðarneyð í nærum hvørjum einasta vanligum langtalvi, er øgiligur snartelvari (í snartalvi hevur ein 5 minuttir til alt talvið). Umframt at hava vunnið FM í snartalvi tríggjar reisir, í 1998, 2001 og í ár, hevur hann eisini verið danmarksmeistari í snartalvi.

Sum sagt varð spenningur um fremstu plássini, kanska meiri spenningur um annað plássið enn ovasta. Tað vórðu at kalla bert Torkil Nielsen, Jóan Hendrik Andreasen og Carl Eli N. Samuelsen, sum fylgdi við John í kappingini. Hesir fýra nevndu telvarar vóru í topp 5 eftir hvørt umfar. Martin Poulsen lúrdi onkrar ferðir í toppinum, men varð eitt sindur ov óstøðugur, eins og mangir aðrir.

**Endaliga støðan í FM í snartalvi 2002:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | IM John Rødgaard | 14 av 18 |
| 2 | Torkil Nielsen | 12,5 |
| 3-4 | Carl Eli N. Samuelsen | 12 |
| | Jóan H. Andreasen | 12 |
| 5 | Martin Poulsen | 11,5 |
| 6-8 | Olaf Berg | 11 |
| | Ólavur Simonsen | 11 |
| | Herluf Hansen | 11 |
| 9-12 | Hans K. Simonsen | 10,5 |
| | Òli Joensen | 10,5 |
| | Suni Merkistein | 10,5 |
| | Rani Baldursson | 10,5 |
| 13-16 | Sámal Christiansen | 10 |
| | Ingolf Gaard | 10 |
| | Andrias Ziska | 10 |
| | Súni Ziska | 10 |
| 17-18 | Rani Nolsøe | 9 |
| | Jákup á R. Andreasen | 9 |
| 19-21 | Tummas M. Anths. | 8,5 |
| | Karl L. Johansen | 8,5 |
| | Rógvi Mortensen | 8,5 |
| 22-24 | Jógvan Joensen | 8 |
| | Helgi D. Ziska | 8 |
| | Hanus Ingi Hansen | 8 |
| 25-26 | Henry Berg | 7,5 |
| | Heri Thomsen | 7,5 |
| 27-28 | Jón Mikkelsen | 7 |
| | Mannbjørn Anths. | 7 |
| 29 | Rógvi Hansen | 6,5 |
| 30 | Andrias Jacobsen | 6 |
| 31 | Hjalti Toftum | 2 |

### Torkil bestan endaspurt

Undan seinasta umfarinum lá John fremstur við einum stigi, meðan Jóan Hendrik hevði eitt stig fleiri enn Carl Eli. Torkil varð á fjórða plássinum, men kundi við at vinna 2-0 á Jóan Hendrik ota seg heilt fram á annað pláss, um úrslitið hjá Carl Eli móti Herlufi Hansen fløskaði seg. Tá Carl Eli og Herluf býttu stigini, og Torkil megnaði at vinna við fullari úrtøku á Jóan Hendrik, so fekk Torkil loksins eitt væl uppiborið annað pláss, meðan Jóan Hendrik og Carl Eli deildu triða plássið. John leikti 1-1 móti Olaf, og varð tað nóg mikið til fyrsta pláss.

Sigast kann at Torkil yvirraskaði við sínari orkufreku telving, og prógvaði hann hendan leygardag, at enn er dugur í honum.

Hinvegin blandaðu Ólavur Simonsen, Hans Kristian Simonsen, Rani Nolsøe og eitt nú Olaf Berg, ikki seg í oddastríðið av álvara. Tað var eitt petti óvæntað, men í snartalvi er so ymiskt. Onkrir dagar vinnur man leikandi lætt, og aðrir hongur einki saman.

John Rødgaard vann sær, umframt FM-heitið, eina peningavirðisløn á 1500 krónur. Torkil Nielsen fekk 600 krónur fyri sítt avrik, meðan Jóan Hendrik og Carl Eli býttu 300 krónur. Teir undir 2000 í rating stríddust eisini um eina virðisløn, og hesa vunnu Suni Merkistein og Óli Joensen, báðir úr Havn. Besti telvari undir 1600 í rating varð Rani Baldursson úr Klaksvík, og vann hann sær eisini nøkur oyrur fyri ómakin.



VB-B36 1-0 (1-0)

# VB tvífaldaði stigatalið

**Eftir sigurin á B36 leygardagin, eru vágbingar við at fáa fatur á hinum liðunum í aðru deild.**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Leygardagin hittust VB og B36 í útsettum dysti á Eiðinum í Vági. Dysturin skuldi eftir ætlan verður spældur í fimta umfari, men vegna verkfall, bleiv dysturin av ongum. Útsetta dystin vann VB við einum máli ímóti ongum, og hetta var eisini hálvleiksstøðan. Dysturin var ikki serliga vælleiktur, har bæði liðini høvdu torført við at fáa tað flótandi spælið at koyra.

### Javnur fyrri hálvleikur

Í fyrra hálvleiki leikaði javnt á, við fáum royndum á málini. Einasta málið í dystinum fall longu eftir sjey minuttir, tá tað eydnaðist Dan Djurhuus at fáa bóltin framvið B36-málverjan. Eftir at VB-leikari brýtur ígjøgnum í høgru, er Dan Djurhuus fyrstur á bóltinum, og kundi leggja VB á odda. Eftir málið, royndi B36 at trýsta VB-liðið og tveir stórir møguleikar spurdust burturúr. Báðu ferðirnar vóru B36 leikarar púra leysir við VB-málverjanum, men misnýttu. B36 trýstið gav eisini vágbingum møguleikar í hinum endanum, og høvdu teir verið eitt sindur hepnari, kundu teir økt um leiðsluna.

Í seinna hálvleiki byrjaði VB betri, og høvdu eisini nakrar royndir á B36 málið. Ta einu ferðina var Kári á Lágabø rættiliga nær við, men royndin hjá honum var ikki nóg neyv, og bólturin fór framvið málinum.

Sum hálvleikurin fráleið, flutti spælið seg meira og meira oman á VB-hálvuna. B36 strongdi á at fáa útjavnandi málið, men teir komu aldrin fram til teir heilt stóru málmøguleikarnir. Nærmasta B36 kom til eitt mál, var tá Helgi Justinussen skallaði á tvørstongina. Helgi Jacobsen hevði eisini eina roynd seint í dystinum, men hepnið var ikki við havnarmonnum, og royndin fór framvið Finnboga Olsen í VB-málinum.

Seinastu løtuna leikaði hart á frammanfyri VB-málið, men vágbingar stóðu mannsterkir, og kunnu nú fegnast um at stigartalið er tvífalda. Fyri B36 var ósigurin ein dyggur smeitur, tí við einum sigri, høvdu havnarmennirnir komið heilt fram í oddin í aðru deild.

**VB-B36 1-0 (1-0)**
1-0 Dan Djurhuus



# Skála kompleksið hjá KÍ er ikki burtur

**Enn eina ferð meiri enn hálvkiksaðu klaksvíkingar ímóti einum av botnliðunum, tá sannførandi leiðsla varð skift út við stríð fyri javnleiki**

SKÁLA–KÍ
*Jóannes Hansen*

Fótbóltur er og verður eitt undarligt spæl. Næstsíðsta sunnudag var KÍ í Runavík. Tá vóru klaksvíkingar svangir. Teir stríddust sum fyri lívinum, og teimum eydnaðist at vinna 1–0. Tað var ein góður KÍ sigur ímóti NSÍ, sum var annað av oddaliðunum.

Sunnudagin vitjaðu klaksvíkingar aftur á Skálafjørðinum. Hesa ferð vóru teir vestaru megin fjørðin. Vertirnir vóru skálamenn, sum ongantíð hava roynt annað í 1. deild enn at vera botnlið.

Tá KÍ var í Runavík var heimafylgið ikki serliga stórt. Misjøvnu avrikini tóktust ikki hava skundað undir hugin hjá fótbóltsglaðu klaksvíkingunum at fara um fjørðin. Eftir útisigurin á NSÍ var avgerðin løtt at taka. Nógv KÍ viðhaldsfólk vóru fyri fyrstu ferð til landskappingardyst í 1. deild á Skála. Men mótsatt tá KÍ var í Runavík, so hilnaðist tað ikki væl á Skála. Úrslitið var 2–2, og tað var bæði eitt vónbrot, og upp á ein máta eisini ein lætti hjá KÍ.

Fyrsta løtan bar boð um, at KÍ skuldi vinna. Sum tá B68 var á Skála mikukvøldið var stórur fjáltur á heimaliðnum fyrstu løtuna. Gestirnir høvdu nógv størsta partin av spælinum, og spurningurin tóktist vera, nær hol fór at koma á, og hvussu stórur útisigurin fór at verða.

KÍ kom á odda, men teir megnaðu ongantíð at binda um. Ofta stóð nógv á frammanfyri Eugen Voda og kring Paula Poulsen og liðformannin Dánial Hansen, sum hesa ferð var í miðverjuni, men tyngdin og svongdin, sum eru so alneyðug fyri at vinna allar fótbóltsdystir, vóru ikki so stór, sum tað sást, tá KÍ var í Runavík. Kurt Mørkøre sendi í tvørtræið, og Bárður á Lakjuni, sum framvegis eigur fyrsta málið í landskappingardysti fyri KÍ til góða, sendi úr góðari støðu og beint á góða málverjan.

Eftir steðgin vóru klaksvíkingar ikki so grammir fyrstu løtuna. Sum í dystinum ímóti B68 loysnaði spælið hjá heimaliðnum meiri eftir stegðin, og teir fingu stóra úrtøku burtur úr møguleikunum. Eftir lítlari løtu vóru teir frammanfyri 2–1, og harvið var møguleiki fyri, at fyrsti sigurin í bestu deildini bara skuldi vera ein hálvan tíma burtur.

KÍ vaknaði sum við kaldan dreym. Sambært spælbýtið hevði tað verið heilt órímuligt, um teir einki høvdu fingið burturúr. Erling Fles varð settur á vøllin fyri at styrkja álopspartin, og tað eydnaðist at javna. Tá restaðu tað tíggju minuttir. Tí kundi tað roknast við, at KÍ fór at leggja nógv fyri í royndini at fáa sigursmálið. Men krútið tóktist at vera uppi. Skálamenn vóru ikki moyrari enn so av brúdleypinum leygarkvøldið hjá miðverjanum Bent Djurhuus, at teir megnaðu at halda tørn.




### Málini

Hjalgrím Elttør skoraði einasta málið í 1. hálvleiki. Hjalgrím hevur havt ilt við at vísa máltevið í bestu deildini, sum hann hevur verið so kendur fyri í yngru deildunum, men nú hevur hann skorað tvær ferðir upp í slag. Í Runavík var tað Kurt Mørkøre, sum átti uppspælið. Hesa ferð var tað Allan Mørkøre, sum stakk fram ímillum í vinstru. Hjalgrím rann frá verjuni, og tá Eugen Voda kom út ímóti, setti Hjalgrím bóltin ímillum nærra stólpan og málverjan.

Eftir steðgin javnaði Gigi Callo, sum hesa ferð var einsamallur rumeni úti á vøllinum. Málið var sera átókt tí, sum Fríðin Ziskason skoraði fyri B68 mikukvøldið. Hornaspark úr høgru varð lagt flatt út frá, og rumenski framrættaði miðvallarin smekkaði flatt ímillum vinir og fíggindar og framvið Meinhardti Joensen í KÍ málinum.

Lítla løtu seinni var Skála frammanfyri 2–1. Dánial Hansen spældi høgt og langt diagonalt úr í vinstru, har Alexander Johansen gjørdist leysur. Tá hann kom ímóti málverjanum valdi hann ósjálvsøkið at spæla Marius Joensen, sum var uppaftur meiri leysur, og so var stórur fagnaður á Skála, har tey tevjaðu deymin frá uppgerðunum í steypakappinginiímóti KÍ. Klaksvíkingar vildu vera við, at talan var um rangstøðu, men tað metti dómarin ikki.

So smoygdi KÍ seg í arbeiðshamin, og tað eydnaðist Erlingi Fles at javna, tá long sending varð send upp um vongverjan hjá Skála í vinstru, og innskifti maðurin gjørdist leysur í høgru.

**Skála:** Eugen Voda – Ronnie Hansen, Dánial Hansen, Pauli Poulsen, Arnhold Berg – Tummas Olsen, Rúni Rasmussen, Gigi Callo – Jónhard Frederiksberg, Marius Joensen, Alexander Johansen
**KÍ:** Meinhardt Joensen – Atli Danielsen, Ove Nysted, Alexander Djordjevic, Rúni Elttør – Allan Mørkøre, Harley Bertholdsen, Allan Joensen, Hjalgrím Elttør – Kurt Mørkøre, Bárður á Lakjuni

## Máltindarnir

**1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| Andrew av Fløtum | HB | 10 |
| Jón Rói Jacobsen | HB | 9 |
| John Petersen | B36 | 7 |
| Øssur Hansen | B68 | 7 |
| Kurt Mørkøre | KÍ | 7 |
| Magni á Lakjuni | B36 | 5 |
| Sámal Joensen | GÍ | 5 |
| Bárður Mortansson | B36 | 4 |
| Hans á Lag | HB | 4 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 4 |
| Óli Hansen | NSÍ | 4 |
| Egil Zachariasen | B36 | 3 |
| Jákup á Borg | B36 | 3 |
| Anders Nygaard | B68 | 3 |
| Sorin Anghel | EB/S | 3 |
| Bartal Eliasen | GÍ | 3 |
| Súni Fríði Johannesen | GÍ | 3 |
| Súni Olsen | GÍ | 3 |
| Ove Nysted | KÍ | 3 |
| Helgi L. Petersen | NSÍ | 3 |
| Sjúrður Jacobsen | NSÍ | 3 |
| Alexander Johansen | Skála | 3 |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| Clayton Soares | FSV | 10 |
| Heini Heinason | ÍF | 7 |
| Jónsvein Thomsen | B71 | 6 |
| Olgar Danielsen | KÍ | 6 |
| Kristian í Vági | LÍF | 6 |
| Eirikur Joensen | Sumba | 6 |
| Bjarni Prior | FSV | 5 |
| Jens Erik Rasmussen | FSV | 4 |
| Rókur á Fløtum Jespersen | HB | 4 |
| Petur Sjúrðarberg | LÍF | 4 |
| Carl Høgnesen | B36 | 3 |
| Ruslan Screlea | FSV | 3 |
| Eyðálvur Petersen | ÍF | 3 |
| Høgni á Lakjuni | ÍF | 3 |
| Høgni Zachariasen | ÍF | 3 |
| Rúni Petersen | ÍF | 3 |
| Bárður Heinason | LÍF | 3 |
| Mortan Hansen | NSÍ | 3< |

## Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 10 | 7 - 2 - 1 | 30 | 9 | 21 | 23 |
| 2 | GÍ | 10 | 6 - 1 - 3 | 18 | 15 | 3 | 19 |
| 3 | NSÍ | 10 | 5 - 3 - 2 | 18 | 13 | 5 | 18 |
| 4 | B68 | 10 | 5 - 3 - 2 | 16 | 14 | 2 | 18 |
| 5 | KÍ | 10 | 5 - 2 - 3 | 23 | 13 | 10 | 17 |
| 6 | B36 | 10 | 4 - 2 - 4 | 29 | 18 | 11 | 14 |
| 7 | VB | 10 | 3 - 3 - 4 | 7 | 8 | -1 | 12 |
| 8 | EB/Streymur | 9 | 2 - 1 - 6 | 9 | 20 | -11 | 7 |
| 9 | TB | 9 | 1 - 2 - 6 | 11 | 38 | -27 | 5 |
| 10 | Skála | 10 | 0 - 3 - 7 | 8 | 21 | -13 | 3 |

## Støðan, 2. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FS V | 9 | 6 - 2 - 1 | 33 | 8 | 25 | 20 |
| 2 | Sumba | 9 | 4 - 3 - 2 | 14 | 12 | 2 | 15 |
| 3 | LÍF | 9 | 4 - 2 - 3 | 18 | 15 | 3 | 14 |
| 4 | ÍF | 9 | 4 - 1 - 4 | 21 | 18 | 3 | 13 |
| 5 | KÍ | 9 | 3 - 4 - 2 | 14 | 14 | 0 | 13 |
| 6 | B71 | 9 | 3 - 3 - 3 | 12 | 8 | 4 | 12 |
| 7 | HB | 9 | 3 - 2 - 4 | 13 | 13 | 0 | 11 |
| 8 | B36 | 9 | 2 - 4 - 3 | 10 | 16 | -6 | 10 |
| 9 | NSÍ | 9 | 3 - 1 - 5 | 8 | 14 | -6 | 10 |
| 10 | VB | 9 | 2 - 0 - 7 | 5 | 30 | -25 | 6 |